









Nógv fólk vóru til tiltakið, og hóast tað var kalt í sjónum, lupu nógv á bláman

ein trupulleiki, átti ikki at borið til, og hetta kann eisini vera eitt problem hjá teimum, ið starvast og ferðast á landi, tá skjótt er at vera somikið óskettin framvið fjøru og havnaløgum, at tað ringasta kann henda.

### Vánaligar umstøður

Tórbjørn Jacobsen nevndi, at hann lærdi at svimja, tá hann var við skipi í Kyrrahavinum sum smádrongur – 4-5 ára gamal. Seinni kom hann betur eftir tí í sminjingarhylinum omanfyri skúlan við Gøtugjógv og á sandinum í Syðrugøtu, men tá hann flutti út á Glyvrar at búgva, fram ímóti miðjuni av sekstiárunum, dugdi ongin annar nemingur í tí flokkinum hann gekk í, at svimja.

– Kanska er støðan batnað hjá teimum, sum búgva her, men tað er ikki myndugleikanum fyri at takka, tí umstøðurnar fyri svimjing eru líka





eiðasørar ídag, sum tær vóru fyri hálvthundrað árum síðani. Hetta, hóast kandidatar til øll býráðsval hesi árini við plikt og bót hava lovað veljarunum, at nú fór tað at henda, at ein svimjihylur varð gjørdur. Stóra innsavningin einaferð í sekstiárunum munaði heldur onki, hóast væl av peningi, í tátíðarmáti, kom á kontu til endamálið, segði Tórbjørn Jacobsen, og hann helt fram:

– Jon Hestoy hevur rætt: Økið er í eini undantaksstøðu, tá tað snýr seg um møguleikar fyri svimjing. Kanska er tað orsøkin til, at fyrireikararnir hava heitt á havnarmeistaran í Runavík um at siga nøkur orð, nú fólk úr landinum eru savnað um einasta svimjingarhylin vit fjarðbúgvar eiga, og tó kanska tann størsta hylin í landinum, allan Skálafjørðin.

Torbjørn Jacobsen endaði við amerikanska hugtakinum frá Vietnam krígnum: »Sink or swim with Ngo Dien Diem.«

– Hugtakið stavar úr amerikanskum journalistikki, eftir at amerikanarar høvdu fløkt seg so væl ella illa uppí vietnamesiskan politikk, at annaðhvørt svumu teir, ella druknaðu teir saman við korrupta forsetanum í Suðurvietnam Ngo Dien Diem. Óneyðugt skuldi verið at sagt, hvør søgunnar dómur gjørdist.

Eftir fundin í saltfiskahúsinum leyp alt, sum krúpa kundi, á bláman, fólk hugnaði sær almikið, og eftir tað høvdu synirnir hjá Zachariasi Leitisstein latið hurðarnar á víðan vegg í neysti teirra, har møguleiki var fyri brúsing og at klæða seg aftur í gerandisdressið. Síðan prátaðu fólk saman, spælt var og sungið, ímeðan litrarnir af kaffi vóru konsumeraðir í ríkiligum máti.

Onkur varnaðist, at havnarmeistarin, sum fyrstur leyp á bláman, var ílatin føroysk tøvd undirklæði. Hann sigur, at hetta partvíst skal skiljast sum ein demonstratión ímóti, at myndugleikarnir ikki fáa uppí lag, at fáa ein svimjingarhyl til vega, og fyri at prógva, at hetta føroyska produktið ivaleyst er heimsins besta bjálvingarklæði hjá menniskjum ímóti kulda. Tað er prógvað í føroyskari siglingarsøgu, og tað var aftur prógvað hendan dagin í fjøruni á Glyvrum, tí havnarmeistarin var líka spelkin, tá hann klóraði seg uppá land aftur, sum tá hann kavaði út av Hvalsisrættarbrúnni.